**Stýrisfundur 17. mai 2016**

| | |
|---|---|
| Dagur og klokkutíð: | mikudagur 17. mai, klokkan 9.00 |
| Fundarstaður: | Lestrarskrivstovan, J.C. Svabos gøta 7 |
| Til staðar: | Herálvur Joensen, stýrisformaður, Marita Rasmussen, Tove Bull, Gestur Hovgaard, Sára Joensen, stýrislimir, Kolbrún í Haraldsstovu, umboð teirra lesandi, Sigurð í Jákupsstovu, rektari, og Jørgen Meitilberg, fyrisitingarstjóri.<br>Juanna Joensen luttók umvegis Skype |

Herálvur bjóðaði vælkomin. Jan Mortensen hevur tikið seg úr nevndini frá 1. apríl at rokna, eftir at hann hevur tikið við nýggjum starvi. Í hansara stað er varalimurin, Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, komin í nevndina. Marita fekk eina serliga heilsan, eftirsum hetta var hennara fyrsti stýrisfundur.

Skráin fyri stýrisfundin varð góðkend.

Fundarfrágreiðingin frá seinasta fundi varð góðkend.

1. **Fundur við Input**

Leiðslan/stýrið hevur heitt á Input um at standa fyri eftirmetingini av bygnaðinum. Í hesum sambandi kunnaðu Marjun Eystberg og Elsa Johanna Høgenni frá Input um tilgongdina higartil.

Skipað hevur verið fyri verkstovum fyri starvsfólkum á deildunum og fyrisitingini, og tann 24. mai verður verkstova fyri lesandi.

Úrslitini frá verkstovunum verða viðgjørd í hugbankanum (tænketank) í tíðarskeiðinum 26. – 27. mai í Skálavík.

Limirnir í hugbankanum leggja á fundi tilmælið fram fyri starvsfólkunum til viðmerkingar. Síðan verður tilmælið tillagað í samráð við limirnar í hugbankanum, og latið rektaranum at leggja fram fyri stýrið.

## 2. Fíggjarstøða

Raksturin pr. miðjan mai 2016 vísir, at Setrið prosentvíst hevur brúkt nakað yvir játtanina, sí niðanfyri, men allar inntøkur eru ikki tiknar inn enn.

Rakstur 2016

**Fíggjarár 2016**
**Fróðskaparsetur Føroya**
**Rakstur**

MVG-just:nei

| | Salda 04-2016 | Játtan 2016 | Avlop 04-2016 | Salda 05-2016 | Salda 04-2015 | Játtan 2015 | Avlop 04-2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 Lønir v.m. | 23.766.266 | 70.215.000 | 66% | 23.902.940 | 21.302.046 | 69.236.000 | 69% |
| 14 Keyp av vørum og tænastum | 3.777.372 | 10.500.000 | 64% | 3.982.492 | 3.399.200 | 8.000.000 | 58% |
| 15 Keyp av útbúnaði, netto | 374.961 | 1.100.000 | 66% | 381.106 | 237.755 | 1.100.000 | 78% |
| 16 Leiga, viðlíkahald og skattur | 932.129 | 2.600.000 | 64% | 1.091.792 | 1.009.121 | 2.528.000 | 60% |
| 21 Søla av vørum og tænastum | -69.628 | -1.000.000 | -93% | -76.774 | -73.016 | -1.500.000 | -95% |
| 32 Útvegan av løgu o.ø. | 0 | 0 | 0% | 0 | 0 | 0 | 0% |
| 52 Tilskot til einstaklingar | 0 | 100.000 | 100% | 0 | 72.152 | 100.000 | 28% |
| 71 Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr) | 14.755 | 0 | 0% | 14.755 | 0 | 0 | 0% |
| 75 Keyps-mvg | 0 | 0 | 0% | 41.614 | 0 | 0 | 0% |
| 76 Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt) | -737.452 | -2.200.000 | -66% | -920.785 | -883.336 | -2.200.000 | -60% |
| 77 Flyting frá kommununum til landið | -498.926 | -1.500.000 | -67% | -498.926 | -288.301 | -1.500.000 | -81% |
| **Tilsamans** | **27.559.478** | **79.815.000** | **65%** | **27.918.215** | **24.775.620** | **75.764.000** | 67% |

Rakstur – søgulig gongd

**Til fíggjarár 2016**
**Fróðskaparsetur Føroya**
**Rakstur**

MVG-just:nei

| | | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Játtan 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 24.625 | 27.649 | 56.871 | 62.923 | 65.641 | 70.215 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 5.618 | 6.139 | 11.040 | 10.865 | 11.193 | 10.500 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 985 | 871 | 1.121 | 1.093 | 664 | 1.100 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 760 | 836 | 2.443 | 2.808 | 2.902 | 2.600 |
| 17 | Avskrivingar o.a. | 0 | 0 | 0 | 0 | 18 | 0 |
| 19 | Ymsar rakstrarútreiðslur | 34 | -0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -413 | -688 | -1.371 | -1.014 | -553 | -1.000 |
| 29 | Ymsar rakstrarinntøkur | 0 | 0 | 0 | -187 | 0 | 0 |
| 52 | Tilskot til einstaklingar | 20 | 38 | 225 | 193 | 80 | 100 |
| 54 | Stuðul til annað virksemi | 35 | 43 | 70 | 50 | 50 | 0 |
| 57 | Rentuútreiðslur o.a. | 1 | 1 | 2 | 0 | 0 | 0 |
| 61 | Skattur og avgjøld | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 62 | Kravd gjøld, bøtur o.a. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 63 | Vanligar flytingarinntøkur | 0 | 4 | 0 | -1.066 | 0 | 0 |
| 65 | Flytingarinntøkur úr útlandinum | 0 | 0 | 0 | 0 | -68 | 0 |
| 71 | Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr) | 167 | 42 | 78 | 63 | 60 | 0 |
| 76 | Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt) | -621 | -241 | -1.391 | -2.327 | -2.494 | -2.200 |
| 77 | Flyting frá kommununum til landið | 0 | 0 | -1.906 | -1.609 | -1.712 | -1.500 |
| | **Tilsamans** | **31.212** | **34.694** | **67.182** | **71.792** | **75.781** | **79.815** |

Meginparturin av játtanini fer til lønir og keyp av vørum og tænastum. Býtið millum løn og rakstur er eitt sindur skeiklað, tí ov stórur partur fer til lønir, hetta setur trýst á virksemið, og tað er ikki nøktandi.

Leiðslan eigur at umhugsa at orða ein politikk fyri uttanhýsis fígging, tí alsamt størri partur av fígging til universitetini koma umvegis uttanhýsis fígging. Setrið eigur harumframt at umhugsa at veita granskarum eina stuðulsfunktión til at søkja uttanhýsis fígging, tí talan er aloftast um torgreiddar og tungar tilgongdir.

Stýrið heitti á leiðsluna um at gera eitt yvirlit yvir allar verkætlanir sum hava verið á Setrinum seinastu árini til komandi stýrisfund.

### 3. Avrikssáttmáli millum MMR og Stýrið

Mentamálaráðið og umboð fyri leiðsluna hava í felag gjørt eitt uppskot til avrikssáttmála millum Setrið og Mentamálaráðið. Leiðslan hevur í fleiri umførum gjørt MMR vart við, at tað er trupult at áseta mál og tilfeingi upp á ársbasis. Uppskotið tekur tí støði í tíðarskeiðinum 2016-2018. Avriksmálini eru í høvuðsheitum innan útbúgving, gransking og fyrisiting. Tilfeingi í mun til avrik er ikki liðugt orðað.

Ætlanin er at fáa uppskotið staðfest fyri summarferiuna. Leiðslan ger uppskotið meira liðugt serliga hvat tilfeinginum viðvíkur. Avgerð varð tikin um, at stýrisformaðurin fær heimild at luttaka í arbeiðinum at fáa uppskotið til avrikssáttmála orðað liðugt.

Sambært § 13, stk. 5 í reglugerðini fyri virksemið hjá stýrinum, skal stýrið orða ein menningarsáttmála millum stýrið og MMR.

| Mál nr. | Avrik | Tilfeingi |
|---|---|---|
| 1.1 | a) Bachelor BSc í orkuverkfrøði<br>b) Masternám við praksislæru í søgu, sosialvísindum & samfelagsplanlegging, politikki & umsiting<br>c) Bachelor BSc í búskaparfrøði<br>d) Master í heilsuvísindi<br>e) Bachelor BSc í læknavísindum<br>f) Joint Nordic Masterprogramme<br>g) Námsfrøðilig útbúgving fyri miðnámsskúlalærarar (Pedagogikum)<br>h) Master í KT-verkfrøði<br>i) Master í lívfrøði<br>j) Hjánám í støddfrøði<br>k) Grundútbúgving í list og kreativiteti (2 ár) | 8 størv |
| 1.2 | a) Styrkja lestrarvegleiðingina<br>b) Styrkja samstarvið við Ráð teirra lesandi | 1 starv |
| 1.3 | a) Menna fjarlestrarmøguleikarnar | 1 starv |
| 2.1 | a) Menna gransking | |
| 3.1 | a) Menna fyrisitingarligar fyriskipanir<br>b) Menna eina góðskutryggingarskipan fyri útbúgvingar | 1 starv |
| 4.1 | a) Samstarvssáttmáli gjørdur við universitet/granskingarstovn | |
| 4.2 | b) Samstarvssáttmáli gjørdur við vinnu | |
| **Tilfeingi til samans** | | **11 størv** |

## 4. Uppskot til broytingar í reglugerð fyri størv á Fróðskaparsetri Føroya

Leiðslan hevur orðað eitt uppskot til broyting í reglugerðini fyri størv á FF. Soljóðandi stykki verður sett inn undir § 8 "Rektarin tilnevnir eftir tilmæli frá dekani eina setanarnevnd. Uppgávan hjá setanarnevndini er í fyrstu atløgu at gera eina heildarmeting av, um fakligi førleikin hjá umsøkjarunum er egnaður til ætlaða undirvísing í starvinum, um granskingaráhugamál og -førleiki hjá umsøkjarunum eru áhugaverd fyri Setrið, og um samstarvsmøguleikar kunnu verða innan og uttan fyri Setrið. Setanarnevndin letur við støði í heildarmetingini rektaranum tilmæli um, hvørjar umsóknir eiga at verða sendar til metingar hjá metingarnevndini, §8, stk.1."

Stýrið tekur undir við broytingini, men mælti til, at broytingin verður umrødd t.d. við Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum, soleiðis at hon ikki er í stríð við vanligar setanarreglur, fyrisitingarlógina ella aðrar mannagongdir.

5. **Politikkur fyri góðskutrygging**

Arbeitt verður við at orða ein yvirskipaðan góðskutryggingarpolitikk. Uppskotið er sent stýrinum til kunningar.

Endamálið við góðskutrygging og góðskustýring á Fróðskaparsetri Føroya er at:

1. Tryggja størst møguligan effektivitet og góðsku í kjarnuuppgávunum hjá Setrinum, sum eru útbúgving, gransking og miðling, samstundis sum sjálvræði hjá starvsfólkum, ið førir til menning, verður tryggjað hjá teimum sum virka
2. Tryggja, at útbúgvingar á Fróðskaparsetrinum hava høga góðsku og eru týdningarmiklar fyri samfelagið
3. Tryggja, at altjóða standardar fyri góðsku í útbúgvingum verða fylgdir í kjarnuvirkseminum og at teir eru í tráð við ESG (European Standards and Guidelines for Quality Assurance)

Stýrið var samt um, at leiðslan skal ansa eftir, at komandi skipanin tekur atlit til tey viðurskifti ið eitt so lítið universitet, sum tað føroyska, virkar undir.

6. **Kunning og umrøða**

   a. **Fyrireiking av framtíðar hølisviðurskiftum til Fróðskaparsetrið**

Landsstýriskvinnan í mentamálum hevur gjørt av at seta arbeiðsbólk at fyrireika eina framtíðarætlan um hølisviðurskiftini hjá Fróðskaparsetrinum í framtíðini. Arbeiðsbólkurin er mannaður við umboðum frá MMR, Setrinum, Landsverki og Bústaðir. Arbeiðsbólkurin hevur havt regluligar arbeiðsfundir hvønn hósdag. Arbeiðssetningurin er rættiliga yvirskipaður, og hevur hetta ført við sær, at tað var neyðugt at avstemma arbeiðssetningin við landsstýriskvinnuna.

Arbeitt verður við at gera eina langtíðarloysn, har Setrið lýsir framtíðartørvin. LV kannar, í hvønn mun bygningurin (Læraraskúlin/Venjingarskúlin) kann nýtast til endamálið. Bústaðir er við til tess at kanna, hvussu lestraríbúðir kunnu hugsast inn í heildina. Eftir ætlan verður tilmælið handað landsstýriskvinnuni í næstum.

   b. **Upptøka 2016 – kvota 2**

Í ár var fyri fyrstu ferð møguligt hjá umsøkjarum at søkja um upptøku elektroniskt. Upprunaliga var freistin fyri kvotu 2-umsóknir fríggjadagin 15. apríl, men vegna tekniskar trupulleikar, so varð freistin longd til mikudagin 20. apríl.

Tilsamans komu 173 umsóknir, til samanberingar komu 149 kvotu 2 umsóknir í 2015. Hóast at fyri fyrstu ferð var møguligt at søkja elektroniskt, so vísti tað seg, at umleið ein triðingur valdi at søkja umvegis teldupost ella bræv.

Býtið millum útbúgvingarnar, sett upp eftir fyrstu raðfesting, gjørdist soleiðis:

| | |
|---|---|
| Sjúkrarøkt | 46 |
| Lærari | 39 |
| Námsfrøði | 37 |
| Búskaparfrøði | 14 |
| KT-verkfrøði | 12 |
| Føroyskt | 4 |
| Søga | 4 |
| Sosialvísindi | 3 |
| Havlívfrøði | 2 |
| Mýlsk lívfrøði | 7 |
| Vistfrøði | 1 |
| Hjánám í støddfrøði | 4 |
| **Tils.** | **173 umsóknir** |

| | | |
|---|---|---|
| Menn | 53 | 30,6% |
| Kvinnur | 120 | 69,4% |

Miðalaldur er 30,2 ár. Miðalaldurin á kvotu 2 umsøkjarum er vanligt eitt sindur hægri enn til kvotu 1. Samlaði miðalaldurin fyri 2015 var 27 ár. Upp til 30% av umsøkjarunum verða tikin inn eftir kvotu 2.

### c. Nýggjar útbúgvingar

#### i. Kreativ útbúgving

Ein arbeiðsbólkur arbeiðir við at orða eitt uppskot til eitt tvey ára diplomnám í listaligum arbeiði. Endamálið er at geva studentinum grundleggjandi ástøðiliga vitan um list og skapan í søguligum og samfelagsligum samanhangi so hann kann ogna sær verkligan førleika til sjálvstøðugt listaligt arbeiði. Evnisøkið er list og listaligt arbeiði. Námsevnini eru helvt um helvt ástøðilig og verklig. Ein partur av námsevnunum er felags evni, og ein partur er treytaður av listaligu leiðini, sum studenturin velur. Leiðirnar eru 6: tónleikur, ritlist, myndlist, leiklist, filmslist og sniðgeving.

#### ii. Bachelorútbúgving í læknavísindum

Arbeiðsbólkur er settur at kanna, hvat krevst fyri at stovnseta eina útbúgving innan læknavísindi í samstarvi við onnur universitet. Arbeiðsbólkurin er mannaður við Hans Paula Joensen, Pál Weihe, Shahin Gaini og Magna Mohr.

### iii. Masterútbúgving í kunningar- og samskiftistøkni

Arbeitt hevur verið við at stovnseta eina útbúgving í fjølmiðlafrøði, men enn er ikki komið so langt. Bergur D. Hansen arbeiðir við at menna útbúgvingina, og eftir ætlan verður fyrsta skeiðið boðið út í ár.

### d. Nýggj starvsfólk

- Orku – Ikki endaliga sett
- KT – Ali Kashif
- Búskaparfrøði – freist 15. mai – 5 umsóknir
- Sjúkrarøkt – 2 størv – 8 umsóknir
- KT-ráðgevi – lærling – Sjúrður Ravnsfjall
- Støddfrøði – meting júst komin
- Námsfrøði – verður sent til metingar

## 7. Ymiskt

Skjøl

- Frágreiðing frá fíggjarleiðara
- Fíggjarætlan 2016
- Avrikssáttmáli – uppskot
- Reglugerð um størv – broytingaruppskot
- Politikkur fyri góðskutrygging
- Profilur – tvey ára útbúgving í listaligum arbeiði